## Ukraina skal í ES

Forsætisráðharrin í Ukraina, Júlía Tímosjenko, sum stillar upp til forsetavalið um átta dagar, segði í gjár, at verður hon vald til forseta, fer hon at virka fyri, at Ukraina fær limaskap í ES innan fimm ár. Hon legði afturat, at sum forseti fer hon at royna at fáa samráðingarnar um limaskap í gongd í hesum árinum. Meiningakanningar benda annars á, at tað verður trupult hjá Juliu Timosjenko at vinna forsetavalið, tí sambært kanningunum er hitt høvuðsvalevnið, Viktor Janúkovitsj, umleið 10 prosentstig frammanfyri. Forsetaskeiðið í Ukraina er fimm ár.



## Arnold í penganeyð

Amerikanski staturin Kalifornia er í so stórum fíggjarligum trupulleikum, at annaðhvørt noyðist Arnold Schwarzenegger, guvernørur, at hækka skattin, ella skal hann spara 20 milliardir dollarar teir næstu átjan mánaðirnar. Stovnurin S&P, sum metir kreditvirðið hjá teimum amerikonsku statunum, sigur, at Kalifornia er tann staturin, sum hevur tað minsta kreditvirðið í løtuni. Schwarzenegger hevur biðið umsitingina læna eina milliard dollarar innan hálvan annað mánað, og eygleiðarar siga, at lánstørvurin verður uppaftur størri í summar.

# Føroyar stórar trupulleikar við sølu av hýsu



*- Íslendska hýsuveiðan hevur onga góðkenning sum so, men kortini meta stóru handilsketurnar, at íslendski hýsustovnurin ikki er í vanda, og at veiðan er burðardygg sum er. Vit, sum selja fisk í Føroyum, royna sjálvandi eisini at argumentera fyri, at okkara veiða er burðardygg, men tað er bara ikki nóg mikið í løtuni, sigur formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum, Símun Jacobsen*

**Føroyskur línuskipari undrar seg yvir, at eingin framleiðari er í Føroyum, sum keypir og virkar hýsu. – Vit fáa meiri fyri íslendsku hýsuna enn hina føroysku. Íslendska hýsan verður seld í Bretlandi sum burðardygg, men ikki hin føroyska, tó at meiri hýsa fæst undir Føroyum enn undir Íslandi, sigur skiparin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Prísurin á føroyskari hýsu á Fiskamarknaði Føroya er sum heild lágur. Tað gongur illa hjá skipum, sum landa føroyska hýsu, yvirhøvur at sleppa av við hana fyri líkinda prís.

At kalla eingin hýsa, sum verður veidd undir Føroyum, fer til virkingar og tað, sum landað og selt verður, fer at kalla alt av landinum óvirkað til smákeyparar kring um í Bretlandi.

### Skipari undrast

Línuskipari, sum hevur vent sær til Sosialin, undrar seg yvir støðuna.

- Vit hava skilt, at trupulleikar eru við sølu av virkaðari hýsu undan Føroyum, tí tær stóru handilsketurnar í Bretlandi siga, at okkara hýsuveiða er ikki burðardygg.

Hann leggur aftrat, at tá teir eru undir Íslandi og landa íslendsku hýsuna í Føroyum, er støðan ein onnur, og tá fæst eisini gjarna betri prísur fyri hetta fiskaslag.

Línuskiparin sigur seg eisini hava skilt, at íslendska hýsan, sum landað verður í Føroyum, saktans kann virkast her á landi og seljast útlendskum keyparum.

- Hvar liggur trupulleikin, og hví er hetta so vorðið? spyr hann.

Línuskiparin reisir eisini spurningin, um ikki okkurt er galið hjá okkum sjálvum, tá íslendingar kunnu fáa síni fiskasløg góðkend hjá handilsketum í Bretlandi – og ikki føroyingar.

- Tað er minni hýsa at fáa undir Íslandi enn undir Føroyum, og tí má tað vera heima hjá okkum, at arbeiði ikki verður gjørt nóg væl – og hundurin soleiðis liggur grivin, sum hann tekur til.

### Stórur trupuleiki

Formaðurin í Føroya Ráfiskakeyparafelag, Símun Jacobsen, ásannar, at stórir trupulleikar eru við sølu av virkaðari hýsu úr Føroyum á bretska marknaðinum.

- Bretland hevur verið okkara stóri hýsumarknaður, og nú vilja tær stóru handilsketurnar ikki keypa okkara hýsu, tí mett verður ikki, at okkara hýsuveiða er burðardygg.

Símun vísir á, at tað eru tær stóru handilsketurnar, sum eisini eru teir stóru og væl gjaldandi kundarnir.

- Hesar ketur hava síni egnu fólk, sum meta um, hvørt fiskurin, tær selja, er burðardyggur ella ikki. Keturnar tora ikki at koma í ta støðu, at eitt nú journalistar leypa á og siga, at tær selja fisk, sum ikki er veiddur úr burðardyggum fiskastovni.

Formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum sigur, at sum er, meta handilsketurnar ikki, at føroyska hýsuveiðan er burðardygg, og tí er støðan, soleiðis sum hon er við hýsumarknaðin.

- Niðri í Evropa hava umhvørvisfelagsskapir nógv meiri at siga enn í útjaðarum sum Føroyum og øðrum londum, ið liggja í útjaðara. Handilsketurnar royna at vera umhvørvisbevístar og tora tí ikki at hava føroyska hýsu í sínum vøruútboði.

Símun Jacobsen vísir á, at hagtølini yvir gongdina í føroysku hýsuveiðini eru almenn, og haraftrat kemur, at ráðgevandi stovnurin ICES ikki er serliga bjartskygdur um føroysku hýsuveiðina.

- Íslendska hýsuveiðan hevur onga góðkenning sum so, men kortini meta stóru handilsketurnar, at íslendski hýsustovnurin ikki er í vanda, og at veiðan er burðardygg sum er. Vit, sum selja fisk í Føroyum, royna sjálvandi eisini at argumentera fyri, at okkara veiða er burðardygg, men tað er bara ikki nóg mikið í løtuni, sigur formaðurin í Føroya Ráfiskakeyparafelag, Símum Jacobsen, sum vit fara at venda aftur til í komandi viku.

# Nógvar landingar í Saltangará hesa vikuna

**Fiskiskapurin hjá partrolarunum hevur sum heild ikki verið so góður higartil í ár, sum hann var um somu tíð í fjør**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fleiri skip hava landað í Saltangará hesa vikuna.

Í dag eru fýra ísfiskatrolarar inni. Heykur og Falkur hava 360.000 pund, og Stelkur og Bakur hava 280.000 pund tilsamans.

Í gjár landaðu eisini fýra ísfiskatrolarar í Saltangará. Rókur og Lerkur høvdu 320.000 pund, og Polarhav og Stjørnan høvdu 340.000 pund tilsamans.

Fyrr í vikuni vóru ísfiskatrolararnir Jaspis og Ametyst inni við fullari last, sum var 270.000 pund.

Garnaskipið Oknin, sum roynir eftir svartkalva, landaði eisini 12.000 pund í Saltangará týsdagin.

### Minni veiða

Á Landingarmiðstøðini Kongshavn í Saltangará siga tey, at veiðan hjá partrolarunum higartil í januar hevur ikki verið eins góð, og hon var um hesa tíðina í fjør.

- Av skipunum, sum hava landað hjá okkum hesa vikuna, eru tað bert Jaspis og Ametyst, sum høvdu fulla last. Nøkur av hinum skipunum, ið hava landað hesa vikuna, høvdu eisini nokso langar túrar. Vit kunnu ikki siga, at veiðan er ring, men higartil í januar hevur hon ikki verið so góð, sum hon var í januar í fjør, siga tey á Landingarmiðstøðini Kongshavn.



*Nógv skip hava landað í Saltangará hesa vikuna. Í dag og í gjár hava fýra ísfiskatrolarar landað hjá Kongshavn*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*